# Mugu tola luktin

– Nú má Javnaðarflokkurin finna útav, hvørjum vit skulu samstarva við í politikki.

Tað staðfesti Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum seinasta vikuskifti.

Hon var so mikið greið í síni meining, at nógvir lurtarar sótu eftir við eini sterkari kenslu av, at ein politisk uppgerð av teimum heilt stóru er á veg í samgonguni.

Hom mælti rætt og slætt til, at Javnaðarflokkurin nú ger støðuna í samgonguni upp.

– Vit mugu finna útav, hvønn vit skulu samstarva við fyri at kunna føra javnaðarpolitkk og fyri at kunna seta tær nýskipanir í verk, vit hava sett okkum fyri.

– Vit mugu meta um støðuna og gera upp við okkum sjálvi um úrslitið, sum er komið burtur úr, er nøktandi ella um tað er ov ússaligt.

## » Javnaðarflokkurin má gera støðuna upp

### Tola luktin

Landsstýriskvinnan gjørdi eisini greitt, at Javnaðarflokkurin má gera upp við seg sjálvan, hvat virðisgrundarlag, hann byggir á og hvørjum flokkum, hann kann føra ein politikk saman við, sum er í samsvari við tað virðisgrundarlagið.

– Tann, sum ikki tolir luktin í tí bakaríðnum, má bara rýma.

– Javnaðarflokkurin kann ikki liva við at framtíðin er borgarlig, soleiðis sum Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins, hevur fráboðað alment.

– Tað skulu vit boða greitt og týðiligt frá, legði hon afturat.

Hon legði afturat, at Javnaðarfokkurin má halda fast um, at tær stóru nýskipanirnar skulu gjøgnumførast fyri at framtíðartryggja búskapin og vælferðarsamfelagið, men tað skal vera á tí virðisgrundarlagið, sum er okkara.

Hon legði afturat, at tað ber ikki til at spara seg burtur úr trupulleikunum.

Samstundis er tað greitt, at tað tekur tíð at gjøgnumføra nýskipanir, so tað má leggjast til brots nú.

– Tí mugu vit gera okkum, greitt, hvat virðisgrundarlag vit skulu byggja á, tað, sum er eftir av hesum skeiðnum og ikki minst, í eini framtíðar samgongu.

# HÓTTIR VI
# ÚR LANDS

**SAMGONGAN** Fær Helena Dam á Neystabø ikki undirtøku fyri sínum krøvum, fer hon at siga landsstýrissesin frá sær

Áki Bertholdsen

– Eg vil ikki taka ábyrgdina av hesum longur!

Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, hevur eitt treytaleyst krav til samgonguna.

Og kravið er, at antin tekur samgongan undir við umfatandi bygnaðarbroytingum á fólkaskúlaøkinum, ella sigur hon landsstýrissessin frá sær.

## » So vil eg ikki sita við ábyrgdini longur

Men hon leggur afturat, at tað er nú, at bygnaðarbroytingarnar skulu setast í verk.

– Tær skulu vera settar í verk tá ið næsta skúlaár byrjar í august, annars eri eg ikki við meiri, sigur landsstýriskvinnan.

Men tað verður longu um einar fýra mánaðir, at Helena Dam á Neystabø fær greiði á, um samgongan gongur krøvum hennara á møti.

Tað hendir tá ið fíggjarkarmurin fyri 2012 verður lagdur fyri Løgtingið í seinasta lagi 31. mars 2011.

### Ikki við longur

Landsstýriskvinnan viðgongur, at tað gongur ómetaliga striltið at fáa undirtøku fyri teimum bygnaðarbroytingunum, sum eru neyðugur.

Sjálv umsitur hon skúlaverkið og lands-



**UPPGERÐ**

*Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, hevur lagt upp til eina uppgerð av teimum heilt stóru í samgonguni og kanska sigur hon landsstýrissessin frá sær longu í vár*